# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ókeypis hjá Landskassanum at gjalda bil MVG aftur

Í seks ár kravdi Toll- og Skatt, sum TAKS tá æt, ov nógv inn í MVG á bilum. Mett verður at talan er um einar 125 milliónir, sum landskassin av órøttum hevur kravt inn. Skatta- og avgjaldskærunevndin, sum er hægsti myndugleiki innan skatta og avgjaldsøkið, hevur talað, og hevur álagt TAKS at viðgera málið. TAKS hevur noktað at viðgjørt eitt ítøkiligt krav um afturgjald av MVG á bili, ið var keyptur innan hetta tíðarskeið, og hevur harvið valt ikki at fylgja hægsta fyrisitingarligan myndugleika innnan skatta og avgjaldsøkið. Tað er løgið, at eingin politikari úr andstøðu ella samgongu hevur tikið hetta mál upp. Hetta er álvarsamt. Tað ber jú ikki til, at eitt nú Fíggjarmálaráðið og stovnarnir harundir seta hægri krøv til borgaran, enn hesir stovnar seta sær sjálvum. Skal borgarin fylgja einari avgerð hjá Skatta- og Avgjaldskærunevndini, so skal TAKS, sum Toll og Skatt nú eitur, sjálvandi eisini.

Harafturat, so er hetta ikki eitt einfalt mál, um at MVG er skeivt útroknað. Her er talan um eina innkrevjing, sum eftir øllum at døma er framd í heimildarloysi, og tí eigur Fíggjarmálaráðið at útgjalda peningin aftur til øll tey, sum hava keypt bil í umrødda tíðarskeiðið. Onkur vil meina, at ein fyrispurningur á tingi var uppá sítt pláss, so borgarin visti, hvar hann fleyt. Tað er ov seint til tað. Tað er uppá tíðina, at Tingið sjálvt sigur Fíggjarmálaráðharranum, hvar borgarin flýtur.

Fyrst og fremst, so eigur ábyrgdin at plaserast fyri hetta mistak bæði politiskt og umsitingarliga, og so má borgarin fáa sínar pengar aftur við einari umbering, óansæð hvussu nógv tíð er fráliðin. Tað kann ikki góðtakast, at TAKS (Toll og Skatt) krevur pengar inn í heimildarloysi. Tað er tað, sum talan er um sambært Skatta- og avgjaldskærunevndini, og hesum kunnu avvarandi myndugleikar ikki liva við. Sagt hevur verið, at hetta kann koma at kosta landskassanum 125 milliónir. Hetta er skeiv tulking. Um ein av órøttum tekur 100 krónur og rindar tær aftur til rætta eigara, so hevur tað ikki kostað viðkomandi eitt klovið oyra. Tað er tað, sum hetta snýr seg um. Tað er púra ókeypis at lata nakað aftur, sum ein ikki átti at havt í fyrsta lagi.

**Sosialurin**

## Teir stóru fiskarnir eta teir smáu

SÓLVIT SIMONSEN



**Hurrá, hurrá, hurrá, og so tað langa hurraaaaaaaa**

Ja so hendi tað aftur, at í hesum føri bleiv B71 trumlað niður í hesum føri.

Tað sum B36 ger, er sera vánaligt og ósportligt. Fyrst løgdu teir eftir málmanninum, men hann var somikið heilhjartaður B71-ari, at tað gekk ikki.

Men B71 skuldi álíkavæl nívast. Teir løgdu so sum Judas við silvurpeningi eftir útispælara, og stóð hann ikki ímóti freistingini.

Hettar er sera hugstoytt. B71 roynir við tungari fígging at venja spælara frá óvitanum av, og tá ið teir eru búnir – so eru millióningarnir hjá B36 har – haps.

Eg skilji ikki, tá ið teir fáa so góðar treytir, og hví tað ikki verður kunngjørd hvørjar treytirnar eru.

Og dreygar tað seg um pengar – eigur so ikki keisarin at fáa sítt.

B36 eigur so nógvar góðar spælarar, at teir mátti verið synd at sett teir til síðis fyri sokallað bygdagrell.

Eg eigi sjálvur tveir stak fittar abbasynir, ið eru ógvuliga glaðir fyri at spæla við B36. Eg vóni ikki at eg komið at uppliva, at teir koma at sita á bonkinum fyri tveir keyptar abbasynir úr B71.

Við ítróttarkøvðu.

## Umhvørvisspekulanturin Al Gore

BOGI GODTFRED



Sosialurin hevði mikudagin ein leiðara um ferðina hjá Al Gore til Føroya og segði, hvussu fittur Bill Clinton var, tá hann var í Føroyum - eisini við fjølmiðlarnar.

Eg fylgdi við Bill Clinton her, men hvørki eg ella nakar annar journalistur varð boðin á tíðindafund hjá Bill Clinton, meðan hann var í Føroyum. Vit stóðu í kuldanum uttanfyri Hotel Føroyar og bíðaðu eftir honum. Rætt skal vera rætt, hann kom yvir til bláfrystu tíðindafólkini at práta nakrar minuttir. Tað var alt.

Bill Clinton gav ikki pressuni meira enn Al Gore. Jú, fyrrverandi amerikanski forsetin var meira høviskur enn varaforseti hansara. Men so er alt sagt um teir báðar - og viðurskifti teirra við føroysku pressuna.

Nú er tað so mangt, sum føroyska pressan má liva við, men til báðar vitjanirnar eru útlendskir journalistar komnir til Føroya, og tað er undranarvert, at fyrireikararnir ikki hava tryggjað teimum, at nakað var at koma til.

**Big business**

Tað Bill Clinton og Al Gore hava fyri er big business. Bill Clinton selir seg sjálvan, men tað eru ikki so nógvir pengar hjá Al Gore í at selja Al Gore, og tí hevur hann gjørt heimsins størsta vandamál til sín boðskap. Veðurlagsbroytingarnar. Men Al Gore hevur ongan boðskap til teirra, sum ikki gjalda fyri hann.

Norska Nobelnevndin syrgdi annars fyri, at Al Gore seinast kom upp í tað liðið av høgt mettum fólki, sum hevur fingið nobelfriðarheiðurslønina fyri ósjálvsøki arbeiði, tað veri seg Desmond Tutu, Nelson Mandela ella Lech Walesa. So tað eru ikki bert føroyingar, ið hava latið seg draga upp á tráð av hesum amerikanska umhvørvisspekulantinum. Og tað er spell, tí boðskapurin um veðurlagsbroytingarnar er álvarsligari enn at hann kann pakkast niður í kuffertið hjá einum slíkum handilsreisandi.

Fyrireikararnir kunnu sjálvsagt bjóða hvørjum teir vilja til Føroya at halda fyrilestur fyri fólki, sum vilja gjalda - eisini Al Gore. Men er tað fyri afturlætnum hurðum, so er tað ikki eitt alment tiltak. Og tá høvuðspersónarnir so heldur einki vilja hava við pressuna at gera, má niðurstøðan vera, at annaðhvørt misbrúka fyrireikararnir fjølmiðlarnar ella lata fjølmiðlarnir seg misbrúka.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.